## Coventry vann í evstu løtu

Fáar minuttir fyri leiklok skoraði Coventry ímóti Hull í næstbestu ensku deildini leygardagin. Hetta var einasta málið, sum kom í dystinum, og Kevin Thornton syrgdi fyri tí. Føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen er við í hópinum hjá Coventry, men hann var ikki við til dystin ímóti Hull. Í farnu viku sat hann á beinkinm allar 90 minuttirnar til ein steypadyst, men hesaferð vóru ikki boð eftir honum til besta liðið. Coventry togaði seg við sigrinum upp á 13. pláss í deildini, har 24 lið spæla við.



## Todi ímóti Ajax

Start og Todi Jónsson skulu í fyrsta umfari í UEFA Cup spæla móti Ajax Amsterdam, sum í europeisku meistarakappingini tapti móti FCK.

Lutakast til UEFA Cup var í fríggjdagin, og tá fall luturin soleiðis, at felagið hjá einasta føroyinginum, sum í hesum kappingarárinum framvegis hevur møguleika at spæla í Europa Cup, skal spæla á heimavølli hósdagin 14. september og á útivølli í Amsterdam hósdagin 28. september.

Venjarin hjá Toda og Start, Stig Inge Bjørneby, sigur, at hann ikki kennir nýggju útgávuna av Ajax liðnum nakað serligt. Tí ætlar hann sær at tosa við Ståle Solbakken, venjara hjá FCK, um, hvussu tað skal spælast móti Ajax. Todi Jónsson og Ståle Solbakken vóru í síni tíð liðfelagar í FCK.

# HB sleppur við skrekkinum

**Páll Mohr Joensen spældi ólógiliga fyri HB í steypadystinum ímóti VB/Sumba, men HB skal ikki tapa dystin. Felagið skal hava bót og missa heimavøll í steypakappingini. Tað er endaliga avgerðin hjá Dómsnevndini hjá Fótbóltssambandinum**

HB-MÁLIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Dómsnevndin hjá Fótbóltssambandinum hevur nú endaliga gjørt av, at úrslitið í steypadystinum millum HB og VB/Sumba tann 25. mars í ár skal standa við.

Málið hevur ferðast aftur og fram millum nevndir og dómstólar seinastu mánaðirnar, men nú tykist endaliga støðan verða tikin.

Dómsnevndin hjá Fótbóltssambandinum staðfestir í sínum úrskurði, at Páll Mohr Joensen spældi fyri HB uttan neyðuga spæliloyvið ímóti VB/Sumba. Meginreglan fyri slíkt brot er, at liðið, sum hevur brúkt ólógligan spælara, verður dømt at tapa dystin.

Dómsnevndin hjá FSF heldur tó, at umstøðurnar tala fyri, at HB ikki skal tapa. Dómsnevndin sigur, at Ítróttardómstólurin hjá ÍSF vísti á 10 ymisk viðurskifti, sum eftir umstøðunum kunnu tala fyri, at víkt verður frá meginregluni.

– Eitt av hesum viðurskiftum er, at øll viðurskifti millum HB og NSÍ vóru avgreidd. Dómsnevndin er samd um, at hetta er ein avgerandi munur, sigur Dómsnevdin.

### Bót og missa heimavøllin

Dánjal Andreasen, Høgni J. Høgensen og Jónfinn Thomsen hava tí skrivað undir ein úrskurð, sum staðfestir úrslitið av dystinum millum HB og VB/Sumba tann 25. mars. HB vann dystin 4-1.

Men HB fær revsing fyri, at felagið ikki hevði øll síni viðurskifti mótvegis Fótbóltssambandinum í lagi, tá ið dysturin varð spældur.

Revsingin er, at HB skal gjalda bót á 15.000 krónur, og felagið missir heimavøllin restina av steypakappingini.

Harvið er tað greitt, at HB skal spæla ímóti EB/Streymi í seinastu fjórðingsfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið, og vinnarin av dystinum skal spæla hálvfinalu ímóti B36.

### VB fylgir gongdini

VB/Sumba er beinleiðis partur av málinum um spæliloyvið hjá Páll Mohr Joensen, og har eru tey langt frá nøgd við avgerðina hjá Dómsnevndini.

– Eftir at hava jagstrað føroyska fótbóltsheimin í nú skjótt eitt hálvt ár, eydnaðist tað HB at fáa broytt siðvenjuna, at um eitt felag hevur nýtt ein ólógligan spælara í einum dysti, verður viðkomandi lið dømt at tapa dystin, skrivar VB á heimasíðu sínari.

– Hetta er stórt afturstig fyri andan í viðtøkunum bæði hjá FSF og ikki minst ÍSF, at øll eru líka fyri lógini.

Nú verða tað tey stóru pengasterku feløgini, ið fáa størsta rásarúmið innanfyri lógarverkið hjá FSF og ÍSF.

VB/Sumba fer als ikki at góðtaka hesa avgerð. Málið er sera einfalt: HB hevur brúkt ein ólógligan spælara í einum dysti, og tað hevur altíð og eigur altíð at verða sekta við, at liðið skal tapa dystin.

– VB/Sumba fer tískil at heita á FSF og ÍSF um at taka málið upp aftur og at hyggja bert eftir hesum málinum í hesari sak og ongum øðrum.

B36 og KÍ, sum vórðu tveitt úr steypakappingini í fjør í líknandi málum, ætla eisini at viðgera avgerðina hjá Dómsnevndini.

EB/Streymur – NSÍ 4-1 (1-0)

# Ruddilig staðfesting a

**Meistaraheitið er nærri enn nakrantíð áður, eftir at EB/Streymur so ruddiliga staðfesti sína støðu sum oddalið sunnudagin, og runavíkingar mugu nokk ásanna, at tað neyvan verður í ár, at teir fáa sítt fyrsta FM-gull**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



Tað er støðan eftir ferðmikla dystinum á Mølini í gjár. EB/Streymur spældi ein einastandandi góðan dyst, og fekk fýra mál við fýra ymsu málskjúttum, og tað í sjálvum sær er ein lítil staðfesting av, hvussu væl EB/Streyma-kollektivið riggar í løtuni.

Runavíkingar kunnu hinvegin ikki vera nøgdir við dystin. Teir vóru langt frá sannførandi og tóktist tað sum um, at teir høvdu gloymt bæði hugflog og stríðsviljan eftir við Løkin í Runavík.

### Heppið men uppborið mál

EB/Streymur vísti beinanvegin viðhaldsfólkunum, at teir vóru komnir á vøllin við tí í hyggju at vinna dystin.

Arnbjørn Hansen var vælupplagdur og gav hann runavíkingum tvær ávaringar tíðliga í dystinum, tá hann staddur ein hálvan metur frá stongini móttók bóltin frá Hans Paula Samuelsen, snaraði sær á og skeyt framvið málinum.

Lítla løtu seinni spælir Bárður Olsen Arnbjørn Hansen leysan, men Jens Martin Knudsen kom væl út og tók skotið frá kollfirðinginum.

Talan var eina ógvuliga lívliga byrjan, har EB/Streymur spældi seg fram til fleiri møguleikar, meðan tað var longri millum vitjanirnar hjá runavíkingum í brotsteiginum hjá René Tórgarð.

Tá fyrra hálvleikur er gott og væl hálvrunnin, vísti Christian Høgni nakað av tí, vit vita hann dugir.

Í einum álopi royna bæði Sorin Anghel og Marni Djurhuus at taka bóltin frá honum, men Christian Høgni Jacobsen bæði krúllar og snarar, áðrenn hann leggur út til Andy Olsen, sum finnur Sonni L. Petersen, ið smekkar bóltin upp um.

Seinastu løtuna undan steðginum kemur EB/Streymur fram til fleiri góðar møguleikar, men hvørki Hans Pauli Samuelsen, Bárður Olsen ella Arnbjørn Hansen hava eydnuna við sær í sínum royndum.

Men høvdu teir ikki eydnuna við sær, so var Ronnie Samuelsen sanniliga heppin, tá hann royndi seg úti frá í yvirtíðini av fyrra hálvleiki.

EB/Streymur er í álopi og NSÍ ruddar burtur. Ronnie Samuelsen fangar leysa bóltin, og úr 25 metrum buldrar hann til. Skotið tekur í økslina á einum NSÍ-ara og snýtir Jens Martin Knudsen fullkomiliga, og soleiðis endar langskotið frá Ronnie Samuelsen mitt í málinum, meðan Jens Martin Knudsen